# VESPUR







## Hjalgrím Elttør:

## Vit skora bara ikki

*B36 hevur ikki havt eydnuna við sær síðstu dystirnar, og hóast fáur hevði trúð tí, líkist støðan kappingarárinum í fjør, tá alt gekk strúkandi fyrstu dystirnar, men síðani steðgaði upp.*

*– Vit hava spælt fimm dystir uttan at vinna, so í løtuni er líka mikið, hvørjum vit møta. Her er ikki annað at gera, enn at arbeiða hart víðari og vinna dystir, sigur Hjalgrím Elttør.*

*– Til tíðir spæla vit væl og eru óhepnir, at vit ikki fáa bóltin inn. Og tað er okkara størsti trupulleiki, at vit skora ikki.*

*Um dystin í gjár, tá B36 var minst líka væl við sum NSÍ í ein tíma, men síðani endaði við at tapa við fýra málum, sigur Hjalgrím, at tað kendist heilt løgið:*

*– Ja, hetta var ein undarlig kensla, tí tað kendist, sum vit til tíðir stýrdu dystirnar í fyrra hálvleiki og nakað inn í seinna hálvleik, sigur hann.*

*– Men tá Dmitrije varð vístur út, opnaðist verjan hjá okkum, og tað kiksaði fullkomuliga hjá okkum, tá vit so royndu at koma afturíaftur. Tá teir skoraðu til 3-1, var liðugt hjá okkum.*